# Upp og niður hjá Maersk Air



*Maersk Air hevur bæði mist og fingið í seinastuni. Charterflúgvingin fyri Star Tour glapp felagnum av hondum. Men um ein mánað verða tvær nýggjar rutur stovnaðar út frá Billund*

**Tað gongur eitt sindur báðar vegir hjá danska flogfelagnum Maersk Air. Herfyri misti felagið leiguflúgvingina fyri Star Tour. Men nú letur felagið tvær nýggjar flogrutur upp**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Danska flogfelagið Maersk Air misti herfyri leiguflúgvingina fyri ferðavinnufelagið Star Tour, visti danska blaðið Take Off at siga um dagarnar.

Talan var um rímiliga nógva flúgving segði Take Off, sum metti, at tað mundi fara at merkjast hjá Maersk Air.

Men sambært blaðnum var stjórin í Maersk Air, Flemming Ipsen, ikki so ovurhonds harmur um tað. Tí sum hann segði, var prísurin komin so langt niður, at hann ikki helt tað vera nakað at flúgva fyri. Hann metti rætt og slætt ikki, at tilboðið, sum eitt annað flogfelag, Sterling, hevði givið og fingið flúgvingina fyri, kundi loysa seg.

Men nú er Maersk Air farið aðrar leiðir, veit Take Off at siga við tíðindabrævi frá Maersk Air sum keldur.

Felagið byrjar tann 26. oktober vær nýggjar rutur úr Billund. Onnur verður til Oslo og hin til Milano.

Roknað verður við væl av flúgving millum Billund og Oslo, tí lagt er út við trimum túrum dagliga mitt í viku. Um vikuskiftini verður flogið einaferð um dagin.

Til Milano verður eftir ætlan flogið einaferð um dagin. Tó verður eingin túrur leygardag.

Flogferðslan úr Billund tykist líkasum at vinda upp á seg, siga fólk í vinnuni. Og stjórin í Maersk Air heldur sambært Take Off, at tølini til Oslo síggja rímilig út sum er, og tí halda tey í Maersk Air, at tað man fara at loysa seg at taka rutuna upp.

Tað verða onnur flogfør, enn tey Boeing 737 flogførini, vit kenna frá Føroyarutuni, ið Maersk Air fer at nýta á hesum nýggju rutunum. Talan verður um tey væl smærri Canadair Regional Jet 200, ið taka 48 ferðafólk, sum verða nýtt.

Í dag røkir bara flogfelagið Sun Air flúgving millum Billund og Oslo.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og rættu nógvar hjálpandi hendur, tá kæra kona og mamma okkara

**Sannemi Hansen**
**Runavík**

lá sjúk, andaðist og fór til gravar. Vit takka øllum tykkum, ið vóru um hana síðstu tíðina og veittu linna, bæði sjúkrasystrar og heimahjálpir.
Somuleiðis vilja vit takka tykkum mongu, sum so væl og á so ymsan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina. Ein serlig tøkk til tykkum í Toftakórinum og tykkum í Orkis, ið pyntaðu kirkjuna so vakurt.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bjarni, Johan Hans og Hilmar Jan**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið góða kona, mamma, vermamma, omma, dóttir og systir okkara



**ALEXANDRA KJÆRBO**
**f. Johannessen**

doyði og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum vitjaðu og bóðu fyri henni, meðan hon var sjúk.
Tøkk øll, ið hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Tøkk til prestarnar Niels Paula Danielsen og Hans Eiler Hammer og til Kristian Fríðrik fyri góð orð í kirkjuni. Somuleiðis tøkk til kirkjutænarar, berarar og sangarar. Og tøkk fyri blómur og gávur.
Eina serliga tøkk til øll á Fiskamarknaði Føroya og tøkk til øll, sum komu inn á gólvið og hjálptu okkum gjøgnum teir fyrstu tungu dagarnar.
Gud signi tykkum øll!

*Vegna familjuna*
**Fríðálvur, Hans Marner og Joan**
**Hans Andrias og Marita**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**ARNHOLT SOFUS PETERSEN**
**ættaður úr Mikladali**
**búsitandi í Noregi**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi tann 14. september, 82 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 26. september kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Esther**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Klaksvíkar Sjúkrahús, konto í Føroya Banka.





**Git og vinn - vinnarin**

Vit takka fyri áhugan tit vístu kappingini á bási okkara á Vøru-messuni '03. Í bókahillini vóru 35.143 talmerktar blaðsíður.

365 gittu og av teimum vóru 72, ið gittu eitt tal millum 30.000 og 39.999.

Vinnari gjørdist:

**Kristina Thomsen**
Postverk Føroya
Frímerkjadeildin

...við talinum 35.200, ið var næst rætta talinum. Hon vinnur eitt gávukort uppá 3.000 krónur í bókum frá einum bókahandli.

**HESTPRENT**
*– tí pappír hevur uppiborið tað besta*

Tel: 314 555 · Fax: 318 026 · teldupost: hestoy@hestprent.fo




# Við bestu viðmælum á enska marknaðin



*Rithøvundurin Gunnar Hoydal hevur fingið tann heldur sjáldsama heiður at verða týddur til enskt.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Skaldsøgan »Undir Suðurstjørnum« eftir Gunnar Hoydal kemur út á enskum tann 16. oktober. Rithøvundurin Fay Weldon gevur bókini tey allar bestu viðmælini**

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Føroyskar skaldsøgur týddar til eitt av heimsmálunum eru líka sjáldsamar sum lundi á jólanátt. Nú jólini nærkast kemur ein av hesum sjáldsomu hendingum fyri.

Heiðurin eigur Gunnar Hoydal, rithøvundi.

Skaldsøgan hjá Gunnari Hoydal »Undir suðurstjørnunum«, sum forlagið Árting gav út í 1991, kemur nú út í enskari týðing undir heitinum »Under Southern Skies«. Marjun Stewart umsetti. Bókin er eisini útkomin á donskum í 1992, og tá týddi Jette Hoydal, sum er kona Gunnar.

### Fay fegnast

Við á enska marknaðin fær bókin eitt viðmæli frá einum av best umtóktu ensku rithøvundunum. Fay Weldon, sum vitjaði Listastevnu Føroya fyrr
í ár, sigur á kápuni til ensku útgávuna, at bókin er eitt høvuðsverk í bókmentum, sum vann bókavirðislønir, um nakað rættvísi var til í hesi verð.

Fay Weldon sigur soleiðis: »A major work of literature – magic, realism, wit and grace, all here in generous abundance. If it were eligible for the Booker prize, and there were justice in the world, this book would surely win it.«

Tað var eitt rithøvundakvøld í Norðurlandahúsinum 29. februar 2000, sum er upprunin til ensku útgávuna. Skipað varð fyri kvøldinum við tí fyri eyga at knýta sambond millum føroyingar og bretar, og sum frá líður at fáa føroyskar skaldsøgur givnar út á enskum.

Í hesum sambandi var Pamela Clunies Ross bjóðað til Føroya, og hon kunnaði seg um føroyskan skaldskap. Hon hitti fleiri høvundar og valdi sjálv skaldsøguna hjá Gunnari burturúr bókarúgvuni. British Art Counsil og Norðurlandahúsið hava síðan stuðlað útgávuni fíggjarliga.

> ” *A major work of literature – magic, realism, wit and grace, all here in generous abundance. If it were eligible for the Booker prize, and there were justice in the world, this book would surely win it*
>
> *Fay Weldon um »Under Southern Skies«*

### Frá byggilist til Skeyk

Gunnar Hoydal hevur havt eitt ógvuliga fjølbroytt arbeiðs- og útgávulív. Kendur er hann fyri starv sítt sum býararkitektur í Havn, sum hann segði seg úr á 25 ára degnum í 1997 fyri at skriva og týða burturav. Hann hevur havt hópin av álitisstørvum, og hevur eitt nú verið formaður í bæði Rithøvundafelagnum, LISA og Arkitektafelagnum.

Millum skrivaðu verkini eru bæði listabøkur um Ingálv av Reyni og Janus Kamban, yrkingar, sangir, tíðartekstir og sangleikurin Skeyk. Umframt »Undir suðurstjørnum« hevur hann eisini skrivað skaldsøguna »Dalurin Fagri«.

### Í fleiri løgum

Eftir annan millumskúlaflokk fór Gunnar saman við familjuni til Suðuramerika, har pápin hevði starv í ST frá 1954-57, og tey árini gjørdist hann kunnugur við suðurlond.

Í bókini ger hann eina ferð aftur til Bolivia og Equador, og hann sigur frá hendingum í Føroyum og londum í Suðuramerika. Bókin er í fleiri løgum, og høvundurin flættar hendingar frá barnaárunum, systkin, fortíð og nútíð í ymiskum høpi upp í søgugongdina.

Skaldsøgan »Under southern skies« kemur út í Onglandi 16. oktober 2003. Forlagið er Mares Nest. Bókin verður eisini at fáa í Norðurlandahúsinum.

## Floytandi føroysk blómubros

**Føroya skúlabókagrunnur hevur givið út Blómubros, sum er savn av føroyskum løgum skrivað á nótablað og lagt til rættis fyri floytu**

NÓTAHEFTI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nú skulu føroysk børn læra tann føroyska tónan. Út er komin bóklingur við føroyskum løgum, sum eru løgd til rættis fyri floytu.

Blómubros er ætlað til tónleikaundirvísingina í musikkskúlaskipanini, og tað er Andrea Heindriksdóttir, lærari í musikkskúlaskipanini, ið hevur lagt til rættis.

Ofta verður svenskt, danskt og enskt tilfar nýtt í musikkskúlaskipanini, og soleiðis fáa tey tann útlendska tónan frá byrjan. Við nýggja heftinum fáa føroysk børn høvi at venja seg við føroyskan tóna, sum vit serliga hoyra í skjaldrum, kvæðaløgum og sálmum. Vónin er, at lítla lagasavnið verður góður stuðul í dagligu undirvísingini og til framførslur.

Í Blómubrosi eru 26 løg. Løgini umboða ymiskar partar av føroyskari sangmentan. Her eru skjaldur, kvæða- og vísuløg, eldri og yngri barnasangir og nøkur gomul føroysk sálmaløg, teirra millum kingoløg.

Løgini eru í summum førum skrivað til fleiri torleikastig, til byrjanarstøði og ávísan førleika. Fleiri løg eru løgd til rættis fyri tríggjar floytur, og onnur hava klaverfylgispæl, ið klavenæmingar kunnu spæla. Sangtekstirnir eru prentaðir aftast í heftinum.

Atli K. Petersen hevur skrivað nótarnar, og Astrid MacDonald hevur myndprýtt heftið. Grafikstudio hevur gjørt permuna, og Einars prent hevur prentað.

Blómubros er 46 blaðsíður, kostar 98 krónur og fæst til keyps í bóka- og tónleikabúðum kring landið.